Jenny Vilhelm

Fra: Fríðrik Heinesen
Sendt: 4. januar 2024 10:11
Til: Annika Poulsen
Cc: Fiskimálaráðið Journal; Marin Katrina Frýdal; Marita Svartá; Jákup N. Olsen; Dan Sofus Hofgaard; Sigurd Lamhauge; Mortan Olsen
Emne: Viðmekringar til uppskot um broyting í løgtingslóg um ferðslu

Hey Annika

Í samband við broytingina í løgtingslógini um ferðslu, hevur Landsverk eina viðmekring ella spurning til broytingina.

Í samband við at §16 b verður broytt, eru nøkur undantøk nevnd í stk 3 til vinnuliga koyring.

Her vil Landsverk tryggja seg, at undantøkini eisini eru galdandi fyri arbeiðskoyring hjá Landsverki, ella í øðrum lagi tryggja, at hendan koyring eisini er umfata av undantakinum, t.d. við at eisini positivt nevna Landsverk í listanum, har undantøkini eru galdandi.

Í samband við arbeiði er ofta neyðugt hjá stovninum at brúka ymsa samskiftisútgerð. Eitt typiskt dømi kundi verið samskifti í samband við kavagrevstur, har okkara bilførarar hava brúk fyri at samskifta í samband við arbeiði, men talan er eisini um aðrar arbeiðsstøður.

Sama støða er nokk eisini galdandi á kommunalum vegi, har fólk hjá kommununi hava brúk fyri at samskifta, í samband við arbeiði. Um man tí velur loysnina við at víðka nevnda listan við undantøkum, kundi teksturin verði "...í akførum hjá tilbúgvingini, bjargingarliði, sjúkraflutningstænastuni ella hjá vegamyndugleikunum, um nýtslan er...."

VINALIGA // REGARDS

FRÍÐRIK HEINESEN
Sivilverkfrøðingur // M.Sc. in Eng
Infrakervi // Infrastructure Department
+298 290 888 // www.landsverk.fo

LANDSVERK

Øll málsviðgerð hjá Landsverki er fevnd av dátuverndarlógini.
Kunning um dátuvernd er at finna her